planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

## Teitur 4. besti sangari í Danmark



Í tónleika blaðnum GAFFA, verður Teitur kosin at verða fjórði besti sangarin í Danmark. Teitur hevur áður fingið sera jalig ummæli frá tónleika blaðnum GAFFA, serstakliga fyri fløguna The Singer . Um fløguna verður m.a. sagt, at longu fyrsta lagið á fløguni veitir prógv fyri, at Teitur dugir at nýta sína rødd til fulnar.



# The Dreams millum tey bestu í Danmark



**Sambært lesaranum hjá tónleikablaðnum GAFFA, eru The Dreams millum tey bestu tónleikanøvnini í Danmark. Av 14 ymsum heiðurslønunum, blivu The Dreams valdur til tríggjar teirra**

The Dreams mugu sigast at hava sligið seg fastar ímillum danir, og ferð eftir ferð vinna ungir føroyingarnar longur fram í tí danska tónleikaheiminum. Seinasti heiðurin teir fingu, var tann, ið lesararnar hjá tónleikablaðnum GAFFA høvdu kosið teir til. Túsundtals danir hava kasta sína atkvøðu, og úrslitið er púra greitt – The Dreams eru millum teir bestu.

Av teimum ymsu heiðurslønunum vóru The Dreams ímillum tríggjar teirra.

**Ársins danska fløga:**
1. Veto: Crushing Digits
2. Spleen United: Neanderthal
3. Tina Dickow: A Beginning, A Detour, An Open Ending
4. Choir Of Young Believers: This Is For The White In Your Eyes
5. The Dreams: Den Nye By

**Ársins danski bólkur:**
1. Veto
2. Spleen United
3. Volbeat
4. The Dreams
5. Choir Of Young Believers

**Ársins danska lag:**
1. Veto: You Say Yes, I Say Yes
2. Spleen United: Suburbia
3. The Dreams: Backstabber
4. Sys Bjerre: Malene
5. Choir Of Young Believers: Next Summer

### Liva dreymalívið í Danmark

At verða kosin at verða millum teir bestu í Danmark hevur eisini sínar fyrimunir við sær. Hóast vit føroyingar ikki gera nógv burturúr at geva gávur til tónleikarar, so er hetta nakað, sum er blivin partur av gerandisdegnum hjá The Dreams. Teir greiða frá í samrøðu við Rás2, hvussu teir ferð eftir ferð móttaka gávur frá ymsum fjepparum, ið á ein og hvønn hátt ynskja at vísa teirra stuðul til bólkin. Hóast óveruligt fyri ungu føroyingarnar, mugu teir sigast at liva dreymalívið í Danmark.

## Buddam – vánaligur tónleikur!

Í einum ummæli frá DrownedInSound fjølmiðlamanninum Chris Beanland, verður føroyski bólkurin Budam rakkaður niður í sand og øsku. Ummæli var gjørt út frá einari tónleika framførslu, ið Budam hevði í Fraklandi í 2008. Beanland sigur, at Budam var so vánaligt, at tað var einasti bólkurin ið ikki var til frama fyri tiltakinum á nakran hátt.



# Linda Andrews í X-factor 16. januar



**Fríggjadagin var føroyska songkvinnan Linda Andrews at síggja í X-Factor á DR1. Tann annars harða dómaratrioin var blást um koll, og Linda Andrews slapp einmælt víðari. 16. januar verður Linda Andrews aftur á skíggjanum í X-Factor kappingini.**

Í rættiliga nógv ár hevur Linda Andrews verið sera virkin í tónleiki. Í fjør gav hon fløguna Revelation út og spældi á Summarfestivalinum. Men hóast hon hevur verið sera virkin, hevur hon ikki heilt sligið seg fasta millum føroyingar. Gjøgnum árini hevur hon uppbygt sær eitt navn sum bakgrundssangari í Danmark, og hevur hon verið sera virkin sum kórleiðari. Men nú hevur unga havnagentan funnið útav, at tað ikki er í bakgrundini hon vil vera. Nú ætlar hon veruliga at bróta ísin, og gongur eftir vild, verður X-Factor júst tann seinasti faktorurin, ið ger at fólk ikki longur spyrja hvør hon er, tá navnið Linda Andrews verður nevnt.

Hóast Linda ikki rættiliga hevur sligið seg fasta í Føroyum, eru tað summi ið hava varnast tað ungu havnakvinnuna. Linda Andrews var nevniliga tilnevnd til Ársins Songkvinnu á Planet Awards 2008, og hóast tað ikki eydnaðist henni at vinna hendan heiður, var hon kosin at verða millum tey bestu í føroyska tónleikaheiminum.

## D.A.D. í Reykjavík

Danski rockbólkurin D.A.D. fer í næstum at spæla eina stuðulskonsert til frama fyri íslendsk lesandi. Konsertin verður á NASA í Reykjavík 24. januar. Konsertin er partur av tiltakinum Because We Care, ið hevur til endamáls at stuðla íslendskum lesandi, ítróttarfólki og listarfólki, sum hava fingið fíggjarligar trupulleikar eftir búskaparkreppuna. Ein danskur vinnulívsmaður hevur tikið stig til stuðulsætlanina, og nú skal D. A.D. hjálpa til at savna pengar í kassan, sum higartil hevur veitt góðar 350.000 krónur í stuðli til ungar íslendingar.